Kunngerðablaðið A
2021
Givið út 24. juni 2021

Nr. 105

23. juni 2021

# Kunngerð um ellisakfør

Við heimild í § 10, stk. 1, § 11, stk. 3 og § 58 a, stk. 1, nr. 2 og 3 í løgtingslóg um ferðslu, sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 10. mai 2000, og § 13, stk. 2, nr. 3 og § 13 a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 9. apríl 2003, verður ásett:

*Ellisakfar í upprunalíki*

**§ 1.** Motorakfar, sum hevur søguligt virði, kann verða allýst sum ellisakfar um:
1) tað er 25 ár ella eldri,
2) tað er varðveitt í upprunalíki og er í lýtaleysum standi, og
3) tað er skrásett sum ellisakfar.

*Stk. 2.* Húsvognar og viðfestiakfør kunnu ikki skrásetast sum ellisakfør.

**§ 2.** Motorakfar, sum eru skrásett sum ellisakfar kann bara nýtast:
1) til koyring av og á, ella
2) til serlig høvi.

*Sniðbroytt ellisakfar*

**§ 3.** Sniðbroytt ellisakfar er eitt motorakfar:
1) sum er 25 ár ella eldri,
2) hevur eitt so mikið broytt snið og kann tískil ikki skrásetast sum ellisakfar, sbrt. § 1, stk. 1, og
3) er skrásett sum sniðbroytt ellisakfar.

**§ 4.** Motorakfar, sum er skrásett sum sniðbroytt ellisakfar kann bara nýtast:
1) til koyring av og á, ella
2) til serlig høvi.

*Aðrar ásetingar*

**§ 5.** Ellisakfar ella sniðbroytt ellisakfar kann ikki nýtast til vinnuligan flutning, vinnuligan fólkaflutning ella til vinnuligt endamál.

*Stk. 2.* Akfar, sum er skrásett sum ellisakfar ella sum sniðbroytt ellisakfar, kann tó, hóast ásetingarnar í stk. 1 verða nýtt til brúðarkoyring, filmsupptøkur ella líknandi høvi.

*Stk. 3.* Akfar, sum er skrásett sum ellisakfar ella sniðbroytt ellisakfar, kann hóast ásetingarnar í stk. 1, nýtast til flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi á bilum o.a., sbrt. kunngerð um flutning av ferðafólki í last ella vørurúmi á bilum v.m.

*Stk. 4.* Søkjast kann um loyvi hjá løgregluni til koyring, sbrt. stk. 3.

**§ 6.** Motorakfør, sum lúka krøvini, sbrt. § 1, stk. 1 ella § 3, men har ætlanin framhaldandi er, at hesi akfør skulu nýtast til dagliga koyring, kunnu ikki skrásetast sum ellisakfør ella sniðbroytt ellisakfør.

*Revsing*

**§ 7.** Við sekt verður tann revsaður, ið fremur brot á § 5, stk. 1 og § 6.

*Gildiskoma og skiftisregla*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 46 frá 12. juli 2004 um ellisakfør.

*Stk. 2.* Akfør, ið eru skrásett sum ellisakfør, áðrenn henda kunngerð kom í gildi, verða viðgjørd sambært ásetingunum í kunngerð nr. 46 frá 12. juli 2004 um ellisakfør.

Fíggjarmálaráðið, 23. juni 2021

**Jørgen Niclasen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason (sign.)